

Føroya Banki aðalfund:

Jóhan Páll Joensen heldur fram sum formaður

Fríggjadagin tann 26. mars 1999 var ársaðalfundur í Føroya Banka

Aðalfundurin samtykti, at av avlopinum fryi 1998 á 306,5 mió. kr., verða 175 mió. kr. útgoldnar í vinningsbýti svarandi til 175% av partapeningi bankans. Eginpeningur bankans verður eftir hetta 961 mió. kr.

Verður partafelagsskatturin tikin við, rindar Føroya Banka í 1999 tilsamans 228,5 mió. kr. til tað almenna. Hetta svarar til umleið 14.500 kr. fyri hvørt føroyskt húski.

Á aðalfundinum fór Jørgen Ulriksen úr nevnd bankans. Sum nýggjan lim í nevndina valdi aðalfundurin Jákup Jacobsen, Gøtu. Í nevnd Bankans eru nú Jógvan Djurhuus, Hirtshals, Høgni Hansen, Tórshavn, Jákup Jacobsen, Gøta, og Jóhan Páll Joensen, Klaksvík, sum allir eru valdir av aðalfundinum, Jógvan Jespersen, Tórshavn, sum er tilnevndur av landsstýrinum, og Niclas Joensen, Tórshavn og Ragnar Olsen, Søldarfjørður, sum eru valdir av starvsfólki bankans.

Nevndin skipaði seg við Jóhan Páll Joensen sum formanni og Jógvani Djurhuus sum næstformanni.

Munur er á krøvum

Meðan norska landsfelagið á løntakarasíðuni (LO) fyrr í hesum mánaðinum gjørdi greitt, at krav teirra til komandi lønarsamráðingar er á leið ein null-loysn, so kravdi Starvsmannafelagið í Føroyum 60% í lønarvøkstri umframt 90 mió. kr. í endurgjaldi.

Noreg er millum allarríkastu londini í heiminum, og oljan ger, at peningagoymslurnar økjast ár um ár. Men hetta merkja vanligu borgararnir ikki altíð, tí politikkurin hevur alla tíðina verið, at Noreg skal konsolidera seg, og ikki lata oljuinntøkurnar fara út í forbrúk.

Nú er so ein lítil stígur komin í norska búskapin, tí oljuprísurin er lágur, og oljufeløgini hava gjørt greitt, at starvsfólk verða uppsøgd.

Á umboðsnevndarfundi í norska LO varð samtykt, at krav teirra til komandi lønarsamráðingarnar er samanlagt ein null-loys, m.a. fyri at tryggja, at arbeiðsplássini ikki verða færri. Hinvegin leggur LO dent á at fáa betri umstøður viðv. eftirútbúgvingum.

Eftir fundin segði LO-formaðurin Yngve Hågensen við fjølmiðlarnar, at:

»Prísir og kostnaðarhækkingar í Noregi noydast at vera á sama stoði sum í teimum londum, ið samhandil okkara er við. Vit skulu arbeiða fram ímóti, at koma á stoði við teir«.

Jú, munur er á krøvum.

Vinarliga
Føroya
Arbeiðsgevarafelag
Jan Mortensen

Yvirlýsing!

Vága Vinnufelag vil við hesum mótmæla, at ósemjur millum partar á arbeiðsmarknaðinum kvetta samferðslulívæðrarnar til útjaðarin. Havandi í huga at hesi øki ikki hava fast samband í tí dagliga, er tað steinur omaná byrðu, bæði hjá vinnulívið og einstaklingum, at einasta sambandið til restina av landinum verður kvett. Hettar ger m.a. at vinnulívið í stóran mun ikki fær vørur til ella frá, og sostatt má leggja ein part ella alt arbeiði niður.

Vit heita tí í fyrsta lagi á politikarnar um at tryggja, at farleiðirnar millum oyggjarnar, ikki verða niðurlagdar hvørjaferð onkur viðkomandi partur á arbeiðsmarknaðinum eru í arbeiðsstøðgi. (T.d. kann nevnast, at bert ein maður á M/f Sam er raktur av arbeiðsstøðginum, men hettar er nokk til at skipið ikki siglir).

Í øðrum lagi, heita vit á fakfeløgini, um at skipa teirra tiltøk móti arbeiðsgevarunum so, at tað ikki sum nú, serliga er útjaðarin ið merkir sviðan av tiltøkunum, meðan miðøkini í landinum, stórt sæð ikki vera nerva.

Nevndin í
Vága Vinnufelag

Yvirlýsing

viðv. støðuni á almenna arbeiðsmarknaðinum!

Heimahjálparafelag Føroya heitir á landsins myndugleikar um, at fáa viðurskiftini viðv. løntakarunum hjá tí almenna í rætt lag.

Vit skulu vísa á, at vit sum felag við 350 limum ið eru alment løntir, og sum sjálvar skulu til samráðingar í juni, vilja geva bæði Starvsmannafelagnum og Sjúkrasystrafelagnum og annars øllum hinum feløgunum, ið eru rakt av hesari trætuni okkara fulla stuðul.

Sum flest onnur feløg hava víst á, so hevur Løgtingið og Landsstýrið sjálvt lagt upp til hesa trætuna geva sær sjálvum lønarhækkan uppá 60%, so at bjóða øðrum løntakarum eina lønarhækkan ið er umleið 57% minni enn teirra egna er í so langt úti.

Støðan í samfelagnum stendur við og versnar undir hesum umstøðunum, og í dag eru flest allir stovnar hjá tí almenna raktir. Í Heimarøktini eru bæði eftirlitskvinnur, økisleiðarar og heimahjálpir í arbeiðsstøðgi í dag, og átti tað at víst ávarandi myndugleikum á álvaran í støðuni ið valdar.

Vit skulu at enda minna á, at vit geva okkara fulla stuðul til tey, ið eru í sáttmálasamráðingum við tað almenna, og kunnu vit bara eggja tey til áhaldni.

Vegna Heimahjálparafelag Føroya
Ása Djurhuus, forkv.

Vinnulív í Vágum gíðsli

Soljóðandi skriv er í dag sent Føroya Landsstýri, Fíggjarmálastýrinum, Føroya Løgtingi, Starvsmannafelagnum og fjølmiðlunum:

Felagskommunan í Vágum vil við hesum skrivi siga frá, at vit taka fult undir við skrivinum frá Vinnulívsfyritøkunum í Klaksvík, dagfest 24. mars 99, og tí, ið Vága Vinnufelag bar fram í fjølmiðlunum 25. mars 99 um arbeiðsstøðgin, sum rakar útjaðarin so meint.

Vit í Vágum kenna okkum sanniliga eisini sum gíðslar í tvídráttinum millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið.

Vit heita tí inniliga á partarnar, um at fáa eina semju í lag, so at útjaðarin ikki áhaldandi líður undir arbeiðsstøðginum í høvuðsstaðnum. Báðir partar siga seg verða sinnaðar at samráðast, men hvørgin vil geva seg so mikið, at samráðingarnar kunnu takast upp aftur.

Samstundis heita vit á Føroya Løgting, um at bera so í bandi, at henda støða ikki endurtekur seg, um nýtt verkfall verður lýst. Vit krevja í minsta lagi, at farleiðirnar um firðir og sund vera opnar undir øllum umstøðum. Tað kann ikki á nakran hátt góðtakast, at partar av landinum verða lamdir, meðan miðstaðarøkið nærum ikki merkir nakað verkfall.

nøvn nú

Heilsanir



Góða Hanna
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum 28. mars.
Ynskir Henriett



Góði Erland
Hjartaliga tillukku við 8 ára degnum.
Ynskja mamma, babba og Brian



Góða Sólrun
Hjartaliga tillukku við 16 ára føðingardegnum. Vónandi minnist tú viðvíkjandi myndini túrin í Aberdeen. Hvat ger tú á myndini?
Heilsan Tóta

nøvn nú 5 ferðir um vikuna

20,- kr.

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 20,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

Myndaheilsanir, sum eru okkum í hendi við postinum kl. 8 á morgni, leggja vit okkum eftir at fáa í blaðið dagin eftir. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:

.....

.....

.....

.....

.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: **»NØVN NÚ«**